## Savna pening til Bibliarium

**Danmark:** Í hesum døgum verður arbeitt við eini ætlan um at stovnseta eitt mentanarhús einaferð í framtíðini við tí endamáli at siga frá søgunum í Bíbliuni, serstakliga ætlað børnum og ungum. Verkætlanin við heitinum "Bibliarium" fekk mánadagin 500.000 krónur í stuðli frá Den Folkekirkelige Udviklingsfond. Hetta hevur givið fyrireikarunum dirvi at halda á við arbeiðinum, sum er at líkna við vísindaligu ætlanina við Experimentarium í Keypmannahavn.



## Fríkirkjur geva mest

**Noreg:** Limirnir í fríkirkjunum eru tey, ið gera mest brúk av skipanini við skattafríum gávum. Í miðal gevur hvør limur einar 9000 kónur til Frikirken og Misjonsforbundet, og er hetta nærum tríggjar ferðir so nógv sum limirnir í norsku fólkakirkjuni geva í miðal. - Hetta er eitt úrslit av skipaðum arbeiði og stórum engagementi frá samkomunum, sigur skrivstovuleiðarin í Misjonsforbundet, Yngve Brosstad við blaðið Vårt Land. Tað er kortini eingin kirkja ella samkoma sum kann kappast við hvítusunnurørsluna. Bara í fjør lótu limirnir í alt 64 mió krónur í gávum til rørsluna.

# Visjon Norge sæst nú hjá Televarpinum

**Eftir at hava sent sendingarnar á God Channel í mong ár, hevur Televarpið nú skift yvir til norsku rásina TV Visjon Norge. - Hetta verður kortini bert gjørt í eini royndartíð, verður sagt úr Televarpinum**

SJÓNVARP
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*God Channel er avloyst av TV Visjon Norge í eina tíð á Televarpinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Byrjað varð við hesum sendingunum seinasta fríggjadag, og líkt er til at fólk eru fegin um sendingarnar.

Serliga stór man gleðin kortini vera millum tað eldra ættarliðið, sum dámar væl at hyggja eftir andaligum sendingum á sjónvarpsskíggjanum.

Tey á Televarpinum eru vitandi um, at fleiri teirra ikki hava skilt so væl ta ensku taluna sum nýtt verður á God Channel.

- Tá vit so royndu at fáa signalið frá Visjon Norge inn - og tað eydnaðist okkum - ja, so byrjaðu vit bara at senda frá teimum, sigur Laila Hentze, stjóri.

Enn hava tey í Televarpinum ikki tikið støðu til, hvussu leingi tey fara at senda sendingarnar hjá Visjon Norge í hesum umfarinum.

### Royndartíð

TV Visjon Norge er fyrsta kristna sjónvarpsrásin í Norðurlondum, sum sendir 24 tímar sjónvarp um samdøgrið. Hetta hevur verið gjørt síðani í mars mánaði 2003.

Rásin verður fyrst og fremst fíggjað umvegis gávur frá trúføstum stuðlum, sum taka undir við visjónini um at røkka norðmonnum, svium, dønum - og nú eisini føroyingum - við gleðiboðskapinum.

Í dag hevur rásin fleiri enn 30 fólk í arbeiði, og arbeiðir bæði innan sjónvarp, útvarp, neyðhjálp, missión, umsorgan, bíbilskúla og kirkjur.

Fyrimunurin hjá føroyingum er, at tey skilja norska málið sum verður borið fram í sendingunum, og kenna helst eisini fleiri av talarunum og nógvar av sangunum, sum verða frambornir.

Hóast rásin sendir alt samdøgrið í Noregi, Svøríki og Danmark, er ikki vist at føroyingar fáa møguleika at síggja allar sendingarnar.

- Vit fara nú at hava hesa rásina opna í eina tíð, og so fáa vit at síggja, hvussu vorðið verður víðari fram, sigur Laila Hentze.

Á Televarpinum sást God Channel frá klokkan 22 til 18.

# Vilja knýta sterk bond við Ísland

**Komandi vikuskifti fáa hvítusunnusamkomurnar Filadelfia og Evangeliihúsið í Havn vitjan úr Íslandi. Tað er fyristøðuparið í Filadelfia, Reykjavík – Ester og Vørdur Traustason – sum koma á vitjan**

SAMKOMUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Millum hvítusunnusamkomurnar í Íslandi og í Føroyum hevur altíð verið eitt ávíst samstarv, har samkomuleiðarar regluliga hava vitjað hvønn annan.

- Sum heild kenna føroyingar seg tættari knýttar at íslendingum enn hinum norðanlondunum, sigur Tummas Jacobsen, fyristøðumaður í Filadelfia í Havn.

Og hann leggur aftrat: - Tað er eitt betri forstáilsi av hugsunnarhátti og mentan okkara millum, og teir føroyingar, sum hava vitjað í Íslandi hava kent fjálga hjartalag íslendinga til føroyingar.

Nú fáa tey í føroysku samkomunum høvið at vísa hetta sama fjálga hjartalagið mótvegis íslendsku gestunum, sum fara at prædika og undirvísa um vikuskiftið fyri samkomulimunum og øðrum áhugaðum.

Umframt hetta fara tey eisini at greiða frá tí, sum rørist innan íslendskt kirkjulív og hvussu teirra egna hvítusunnurørsla er skipað.

Hetta hevur helst stóran áhuga millum føroyingar, tí her á landi finst eingin hvítusunnurørsla, men fleiri hvítusunnusamkomur, sum hava eitt gott samstarv sínámillum.

Vitjanin hjá Ester og Vørdur Traustason byrjar leygardagin við undirvísing í Filadelfia, og heldur síðani fram sunnudagin við morgunmøti í Filadelfia og møti um kvøldið í Evangeliihúsinum.

### Munur á samkomum

Hóast vit liggja lið um lið í Norðuratlantshavi, er íslendska kirkju- og samkomulívið nógv øðrvísi enn í Føroyum.

- Hjá okkum er ein djúp og rótfest gudstrúgv í fólkinum, men soleiðis er ikki í Íslandi. Og tí hava eisini nógvir føroyingar verið í Íslandi fyri at hjálpa til við teirri kristnu boðanini, greiðir Tummas frá.

Hóast hetta, hevur Hvítusunnusamkoman í Reykjavík staði í støðugum vøkstri hesi seinastu árini, og telist ídag millum tær stóru samkomurnar.

Tey hava rættuliga mong tiltøk, t.d. jólakonsertir og almenna innsavnan til at hjálpa fátøkum, bara fyri at nevna nakað. Seinni í vár fara tey at hava ein serstaka konsert, har løgreglusangkórið í Reykjavík fer at syngja saman við øðrum sangarum.

- Hetta tiltakið er gjørt fyri at hjálpa til at økja um ferðslutryggleikan. Í hesum sambandi fara einir 40 motorsúkklukoyrarar at luttaka. Fyristøðumaðurin, Vørdur er ein teirra!, sigur Tummas.

Umframt boðanina, fara Ester og Vørdur somuleiðis at greiða frá tí stóra arbeiðinum, sum Filadelfia, Reykjavík stendur í, og øllum teimum mongu tiltøkum sum tey skipa fyri.





*Ester og Vørdur Traustason vitja í Føroyum um vikuskiftið*